Chrysler 300C 3,0 V6 CRD:

# Amerikanskt dollargrin við týskum kvaliteti

**Chrysler 300C sær út sum eitt ordiligt amerikanskt dollargrin við øllum tí sum har til hoyrir. Men bilurin er eisini merktur av, at hann er í somu familju sum Mercedes. Ein heppin blanding av ameikanskum og týskum stíli**



Chrysler 300C sær út sum eitt ordiligt amerikanskt dollargrin við t.d. stórum kølaragittari, lágum rútum og stórum 18" hjólum

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Chrysler hava seinnu árini gjørt nógv burtur úr sínum modellum. Teir koma javnan á marknaðin við fleiri sermerktum bilum. Eisini hava teir eina stóra vøruskrá á evropeiska marknaðinum við bæði størri og smærri bilum, heilt frá Pt-Cruiser til stóra familjubilin Voyager.

Ein av sermerktu modellunum hjá Chrysler er 300C, ið er ein ektaður amerikanari í breiðastu merking. Hann hevur alt, sum hevur sermerkt amerikanskar bilar gjøgnum tíðirnar. Bilurin er stórur allar vegir, bæði innan og uttan við t.d. stórum kølaragittari, lágum rútum, stórum 18" hjólum, og designi, sum minnir um amerikansku bilarnar frá 60-unum. Tá tað er sagt, er eisini nógv evropeiskt við bilinum, tí Chysler hoyra til DaimlerChrysler-konsernina, og nógvir av komponentunum eru frá Mercedes. Ein heppin blanding av ameikanskum og týskum stíli.

Alt er standard í hesum bilinum, tað einasta sum er eyka, er leðurkabinan sum er virkuliga flott, og kvaliteturin er fult á hædd við evropeisku bilarnar, sum Chrysler 300C kappast við. Av útgerð kunnu vit nevna t.d. 2-sonu klimaanlegg, fartpilot, informatiónsdisplay við koyriteldu, memory-funktión til stilling av forsetrum, síðuspeglum og radio, parkeringsalarm, Xenonlyktir, hjóltrýstsvísara, bremsuassistent, og el-stilling av rattinum.

At koyra bilin er ein sonn frægd - nakað heilt serligt. Kabinan er so væl ljóðisolerað, at V6 CRD dieselmotorurin við 218 hk næstan ikki hoyrist, sama er við ljóðinum frá hjólunum. Hetta er nakað, sum amerikanararnir eru spesialistar í.

Chrysler 300C fæst við fleiri ymiskum V6 motorum og V8 motorum, har tann største í SRT-8 útgávuni er upp á 425 hk, og toppferðin er ikki minni enn 274 km/t. Við Chrysler 300C satsa amerikanararnir eisini upp á evropeiska marknaðin. Umframt í USA, verður bilurin eisini gjørdur í Eysturríki. Chrysler 300C verður eisini gjørdur sum stationcar, og fæst sum forhjólstrektur ella við all-wheel-drive.



*Leðurkabinan er flott og væl ljóðisolerað, og kvaliteturin er fult á hædd við evropeisku bilarnar, sum Chrysler 300C kappast við*



*Chrysler er 300C er ein ektaður amerikanari við gjøgnumførdum týskum kvaliteti*

## FAKTA

### Chrysler 300C 3,0 CRD

| | |
|---|---|
| **Motorurin** | 3,0 litur V6 CRD diesel 218 hk |
| **0-100 km/t** | 8,3 sek |
| **Bensinnýtsla** | 12,3 km/l blandað koyring |
| **Dekkstødd** | 225/60-18 |
| **Stødd og vekt:** | |
| **Longd** | 501,5 cm |
| **Breidd** | 188,0 cm |
| **Hædd** | 147,5 cm |
| **Eginvekt** | 1761 kg. |
| **Viðførisrúm** | 504 litrar |
| **Prísur** | úr 535.000 kr. |
| **Søluumboð** | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>*www.ivan.fo* |